FØROYA HANDILSSKÚLI

# Føroya Handilsskúli í Havn søkir eftir
# LÆRARUM



Treytað av ætlaðum virksemi søkir Føroya Handilsskúli eftir lærarum til HH og FHS í Tórshavn frá 1. august 2010. Talan er antin um tíðaravmarkað starv skúlaárið 2010/2011 ella um fast starv, um umsøkjari hevur útbúgving, sum hóskar til tørv skúlans.

Setanarkor til fast starv: Tvey tey fyrstu árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum verða settir í fast starv, hava skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til, og mugu vera til reiðar at fara undir námsfrøðiliga útbúgving.

Løn: Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjamálaráðið, ella eftir avtalu.

**Lærarar til gymnasialu yrkisútbúgvingina (HH):**
Søkt verður eftir lærarum til hesar lærugreinir: Altjóða búskap B, Danskt A, Enskt B, Føroyskt A, Heimspeki C, Mentanarfatan C, Samfelagsfrøði B, Samtíðarsøgu B, Sálarfrøði C, Støddfrøði B, Sølubúskap B, Vinnulívsrætt C og Virkisbúskap B.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella onnur hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Hon skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2010. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Olav Absalonsen á telefon 317177, teldupostur: oa@hsh.fo.

**Lærarar til yrkisútbúgvingina (FHS):**
Søkt verður eftir lærarum til hesar lærugreinir: Føroyskt C, Innovatión C, Marknaðarførslu C, Støddfrøði C, Virkisbúskap C og Visuella marknaðarførslu C.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2010. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: sp@hsh.fo.

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 400 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH), sum er ein 3 ára gymnasial útbúgving, og umleið 150 á grundútbúgving innan Fyrisiting, Handil og Skrivstovu (FHS), sum tekur eitt ár, og gevur atgongd til lærlingaútbúgving og til 2-ára HH, har FHS telur sum tað fyrsta árið av trimum. Undirvísingin fer fram í Havn pg á Kambsdali. Í Havn starvast umleið 35 lærarar og á Kambsdali umleið 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri skrivtovulærlinga- og handilslærlingaútbúgving og fyri hægri útbúgvingum sum HD og Akademiútbúgving.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*

Frúutrøð 1 · Postboks 353 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 302472
Fax 302471 · kvoldskulin@torshavn.fo · www.kvoldskulin.fo

## Summarskeið í Kvøldskúlanum

**Skeið 1 Skeið í tekning og máling**
*Skeið nr. 2702*

Skeið í tekning og máling verður fyri øll áhugað við og uttan royndir í viku 18 frá 3. til 7. mai 2010 – allar dagar kl. 17.30 - 20.30

Skeiðið er lagt soleiðis til rættis, at tað verður felags undirvísing í lit- og tilfarslæru, teknikki og kompositión

Einstaklingavegleiðing verður givin.
Um viðrar, verður farið út í náttúruna at gera skitsur.
Miðað verður eftir, at hvør luttakari finnur sín egna stíl.
Brot úr føroysku listasøguni.
**Stað:** Læraraskúlin
**Kostnaður:** 460 kr
**Skeiðsleiðari:** Arngerð Joensen, tlf. 314766

**Skeið 2 Skeið í tekning og máling**
*Skeið nr. 2703*

Skeið í tekning og máling, fyri fólk við royndum, verður í viku 23 frá 7. til 11. juni 2010 – allar dagar kl. 17.30 – 20.30

Skeiðið fevnir um tekning, máling, litlæru, ljós og skugga, perspektiv og kompositión.

Brot úr alheims listasøguni v.m.
Um viðrar, verður farið út í náttúruna at gera skitsur.
Lutvíst verður felagsundirvísing og lutvíst einstaklingavegleiðing.
Miðað verður eftir, at hvør luttakari finnur sín egna stíl.
**Stað:** Lærarskúlin
**Kostnaður:** 460 kr
**Skeiðsleiðari:** Arngerð Joensen, tlf. 314766

Tilmelding til bæði skeiðini verður umvegis heimasíðu Kvøldskúlans, www.kvoldskulin.fo. frá 19. til 28. apríl.

*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*

